gult26 cyan26 magenta26 svart26



## Hósdagur 17. mai

**SVF**

18.30 Mús og Múli 2 5
18.35 Jumanji 18 25
19.00 Teknifilmur
19.30 Á ferð við United Voices (e)
20.00 Dagur og Vika við Grannum okkara
20.50 Bryggjarin 1:12 – donsk røð
21.45 Vald andanna – donsk dokumentarrøð
22.25 Krimitímin: Dalziel og Pascoe 1:2 – ensk krimirøð
23.25 Liðugt

**Eurosport.com**

07:30 Golf
08:30 Car Racing
09:00 All Sports
09:30 Olympic Games
10:00 Tennis (Live)
19:00 Tennis
20:00 Tennis
21:00 Cycling
22:00 News
22:15 Rally
22:45 Football
00:15 News
00:30 Close

**BBC PRIME**

00.00 TLZ: »Reputations – Dr Martin Luther King – Days of Hope«
01.00 TLZ: »Future Fantastic – I, Robot«
02.00 TLZ: »What have the090s ever done for us?«
02.10 TLZ: »Background Brief – Time Travel for Beginners«
02.30 TLZ: »The Crunch - Commercial Union«
03.00 TLZ: »Environmental Solutions?«
03.30 TLZ: »Large Scale Production«
04.00 TLZ: »Talk Spanish – Ordering A Meal & Travelling Around«
04.15 TLZ: »Talk Spanish – Leisure Activities & Going Out in Town«
04.30 TLZ: »Zig Zag – Weather – Temperature«
04.50 TLZ: »Changing Places«
05.30 TLZ: »English Zone«
06.00 Noddy: »Noddy and the Broken Bicyc«
06.10 William's Wish Wellingtons: »William and The Alien«
06.15 Playdays
06.35 Insides Out
07.00 The Really Wild Show
07.30 Ready Steady Cook
08.15 Style Challenge: »Early Babies«
08.40 Real Rooms: »Bristol Hallway«
09.05 Going for a Song
09.30 Battersea Dogs Home
09.55 Antiques Roadshow: »Greatest Finds Special«
10.25 TLZ: »Horizon – Sudden Death«
11.15 Charlie's Garden Army: »Culross«
11.45 Ready Steady Cook
12.30 Style Challenge: »Crufts«
13.00 Doctors: »The Accused«
13.30 Eastenders
14.00 Real Rooms
14.30 Going for a Song
15.00 Noddy: »Noddy and the Broken Bicyc«
15.10 William's Wish Wellingtons: »William and The Alien«
15.15 Playdays
15.35 Insides Out
16.00 The Really Wild Show
16.30 Totp Eurochart
17.00 Changing Rooms: »Sheffield«
17.30 Doctors: »A Stranger in the Family«
18.00 Eastenders
18.30 Barking Mad
19.00 Are you being served?: »Grounds for Divorce«
19.30 Dad's Army: »The Godiva Affair«
20.00 Casualty
21.00 Goodness Gracious Me
21.30 Totp Eurochart
22.00 Summer in the Suburbs
23.30 Doctor Who: »Terminus«

**BBC WORLD**

00.00 BBC News
00.30 HARDtalk (r)
01.00 BBC News
01.30 Holiday (r)
02.00 BBC News
02.30 Reporters (r)
03.00 BBC News
03.30 Asia Today (r)
03.45 World Business Report (r)
04.00 BBC News
04.30 HARDtalk (r)
05.00 BBC News
05.30 Top Gear (r)
06.00 BBC News
06.30 Reporters (r)
07.00 BBC News
07.30 HARDtalk
08.00 BBC News
08.30 Talking Movies (r)
09.00 BBC News
09.30 Reporters Special (r)
10.00 BBC News
10.30 HARDtalk (r)
11.00 BBC News
11.30 Holiday (r)
12.00 BBC News
12.30 Reporters Special (r)
13.00 BBC News
13.30 HARDtalk (r)
14.00 BBC News
14.15 World Business Report
14.30 Top Gear (r)
15.00 BBC News
15.30 Reporters Special (r)
16.00 BBC News
16.30 Asia Today
17.00 BBC News
17.15 World Business Report
17.30 Talking Movies (r)
18.00 BBC News
18.30 World Business Report
18.45 Sport Today
19.00 BBC News
19.30 HARDtalk (r)
20.00 BBC News
20.30 Click Online Special
21.00 BBC News
21.30 World Business Report
22.00 BBC News
22.30 Life
23.00 BBC News
23.30 World Business Report (r)
23.45 Asia Today

**3**

05:00 Børne-hjørnet med Disney
07:05 Garfield og venner
07:35 TV-shop
08:20 Hvide Løgne(G)
08:45 Ricki Lake(G)
09:35 Træneren
10:05 Horton-sagaen(G)
10:55 Horton-sagaen
11:45 Melrose Place - classic
12:40 Vild med dig
13:10 Panter-tanter
13:40 Ricki Lake
14:30 Baywatch
15:25 Pæn pige - sej sild
15:55 Min kære familie
16:25 Ricki Lake
17:25 Sportsnyhederne
17:30 Sabrina - skolens heks
18:00 Susan - sød og single
18:30 Hvide Løgne
19:00 GRISK - når det gælder
20:00 Bidske bæster
21:45 Heksene fra Warren Manor
22:40 Vore værste år
23:10 Simpsons
23:40 Ti tommelfingre
00:10 Monty Pythons flyvende cirkus
00:50 Kojak
01:50 Caroline, karrieren og kærligheden
02:35 Vore værste år(G)
02:50 Monty Pythons flyvende cirkus(G)
03:25 Sunset Beach
04:10 Godnat

**ÚF**

07.00 Tíðindi
07.05 Morgunlesturin
Jákup Kass á Strondum lesur
07.15 Barnaløtan
Jonna Olsen og Kári Sólstein stíla fyri
07.30 Tíðindi
07.35 Morguntónleikur
08.00 Tíðindi
08.03 Morgunrásin
09.00 Tíðindi
09.03 Morgunrásin
09.50 Morgunlesturin (e)
Jákup Kass á Strondum lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fyrrapartsløg
Kim Hansen stílar fyri
11.00 Tíðindi
11.03 Koparskrínið (e)
Dánjal Joensen lesur 2. part av framhaldssøgu eftir Jens Paula Heinesen.
11.30 Undir døgurða
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Heimurin í dag (e)
Óluva Zachariasen leggur til rættis
13.30 Tónleikur
14.00 Fimmarin (e)
Sigmar Bláberg stílar fyri
15.00 Tíðindi
15.03 Frívaktin
Sending við tónleiki og práti um sjómanslív. Elis Poulsen skipar fyri
16.00 Tíðindi
16.03 Kári Annand Berg spælir tónleik
17.00 Tíðindini
17.05 Í Víngarðinum
Símun Jóannesarson Hansen stílar fyri
18.05 Barnaløtan (e)
Jonna Olsen og Kári Sólstein stíla fyri
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
19.00 Tilvera
Armgarð Arge leggur
19.30 Harmonikutónar
Flóvin Jacobsen skipar fyri
20.30 Á sanganna veingjum
Gunnvør Poulsen stílar fyri
21.00 Tíðindi
21.05 Dagsetur
Ginna Midjord skipar fyri
22.00 Rák
Anita Ottosen stílar fyri
23.00 Tíðindi

**Rás 2**

09.45 Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10.00 Léttur tónleikur
11.00 Birgir Beinleiðis - Birgir Sondum við gesti
12.00 Tíðindi & Lýsingar
13.00 Leysaløtan - Innsløg, prát og tónleikur
14.00 Ynskiløtan - Heilsur frá lurtarunum
15.00 Tíðindi og lýsingar
15.15 Ynskiløtan (framhald)
16.00 Laila Beinleiðis - Country, Laila Jacobsen leggur til rættis
17.00 Norðlýsið! - Aktuell sending úr Studio 7 í Klaksvík. - John William og Oliver Joensen leggja til rættis
18.00 Tíðindi og lýsingar
18.15 Léttur tónleikur
19.00 Orð á leiðini EVR-sending - Pætur apostul: »Hin ólærdi, sum skrivaði!« - Jógvan Zachariassen leggur til rættis
19.40 Tónleikur
21.00 Tíðindi og lýsingar
21.15 Orðið (e) - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21.30 Girlzone - Undirhaldssending fyri ung, Súsanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri. - Telefon: 359993 Fax: 359990 E-mail: girlzone@ras2.fo

**Lindin**

13.00 Byrjan – Dagsskrá
13.15 Okkara dagliga breyð
13.30 Sjómanssendingin Vitin, vertur er M.C. Restorff (e)
15.00 Frá hjarta til hjarta (e)
17.00 Ungdómssendingin Get Ready v/ Rigmor og Rebekku
18.00 Dagsins Orð
18.05 Logos II tíðindi á Lindini
18.30 The Finishing Touch, ensk sending við tónleiki og práti. Vertur er Alex O'Campo
19.00 Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending.
19.05 "The Finishing Touch" heldur fram
20.00 Tónleikur fyri børn.
20.30 Okkara dagliga breyð
20.40 Møti kunngeðir fyri komandi vikuskifti.
21.00 Bønarlinjan við gesti. Bønarevni kunnu ringjast inn frá kl. 20.00. Tlf. 321377 og til ber at senda fax á nr. 321379. Vertur: Jenis av Rana
Vit gevast uml. middnátt

## Tilvera

**ÚF Hóskvøldið kl. 19.00**

Evnið í Tilveru hóskvøldið er ótti. Marit Poulsdóttir av Tvøroyri misti pápa sín brádliga, tá hon var 9 ára gomul. Hetta var ein stór sorg fyri hana, men tá varð ikki hugsað so nógv um børn, sum syrgdu. Øðrvísi er í dag. Nú skal sorgin gjøgnumlivast, so hon ikki dagar undan aftur. Hjá Marit kom sorgin framaftur, og sum hon vaks, gjørdist hon alsamt meiri bangin. Sálarfrøðingurin Ásvør Skaalum er eisini í útvarpsstovuni. Armgarð Arge leggur til rættis.

## Fierce Creatures

*–Enskur amerikanskur skemtifilmur frá 1997*




Tann gamli djóragarðurin Marwood er í fíggjarligum trupulleikum, og tá tann eirindaleysi ríkmaðurin McCain keypir garðin, ger hann av at sleppa sær av við øll djórini, tó ikki tey, ið eru veruliga vandamikil og spennandi.

Tann nýggi leiðarin á garðinum, tann harðrendi Rollo Lee, og hansara felagi, tann avbera vakra Willa Weston, fáa tó skjótt at sanna, at arbeiðsfólki á garðinum ikki ætlar sær av við øll tey fittu djórini. Hetta elvir til nógvar skemtiligar hendingar.

## Heksene fra Warron Manor (38)

*–Amerikanska dramarøð*




Fyrsta uppgávan hjá Prue verður at avmynda ta óhepnastu kvinnuna í San Francisco, Maggie Murphy. Ein skelkað Prue bjargar í seinastu løtu Maggie Murphy og gandar hennara óeydnu burtur.
Harvið hevur Prue lagt seg út við ta óndu megina, ið hevur plága Maggie við óeydnu í fleiri ár – og hesa megi við Prue hava beinda burtur, so at bannið kann halda fram.

gult27 cyan27 magenta27 svart27

ítróttur

Nr. 98 • hósdagur • 24. mai 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Todi hevur givið avboð

**Fremsti føroyski spælarin hevur kent tað sera torført at taka eina skynsama avgerð, sum stríðir ímóti hjartanum**

LANDSLIÐSPRÁT
*Jóannes Hansen*

Nú er tað greitt. Todi Jónsson verður ikki við, tá landsliðið leygardagin í komandi viku og mikukvøldið í aðru viku fer at spæla heimadystir í HM undankappingini.

– Eg havi havt sera ilt við at taka avgerðina. Hjartað hevur verið fyri at spæla við Føroyum, men skilið hevur sagt mær, at akkurát nú átti eg at geva avboð. Eg havi útsett og útsett avgerðina, men seinnapartin týsdagin ringdi eg til Allan Simonsen og segði honum, at eg ikki eri tøkur á landsliðnum í løtuni. Allan Simonsen segði seg harmast um avgerðina, men eg eri fegin um, at hann sum fyrrverandi spælari á hægsta støði tóktist skilja mína avgerð.

Hetta sigur Todi Jónsson. Hann vil ikki hava, at vit kalla hann fyri fyrrverandi landsliðsspælara:

– Eg havi ikki sagt landsliðnum endaliga farvæl. Tað er eingin loyna, at mær hevur dámt sera væl at umboða Føroyar, og tað kann væl vera, at tað verður aktuelt aftur, um venjarin fer at úttaka meg, men fyribils hava eg givið avboð.

Er tað FCK, sum hevur trýst teg at geva avboð?

– Als ikki. Hetta er mín avgerð, og eg vóni, at fótbóltshugaðu føroyingarnir, sum eg veit fylgja væl við tí, sum gongur fyri seg í FCK, skilja avgerðina.

Hvat er orsøkin?

– At eg fleiri ferðir havi verið skaddur, tá eg eri komin aftur til FCK, eftir at eg havi verið á landsliðnum, haldi eg vera tilvildarligt. Men tað kemst ikki uttan um, at hetta lúrir í huganum. Ikki minst nú vit liggja so væl fyri at vinna DM, og tað harvið kann gerast veruleiki hjá okkum at spæla í Europa Cup og kanska í meistarakappingini. Eg haldi, at hesin næstan óttin fyri at verða skaddur, hevði havt ávirkað spælið hjá mær. Tá tú roknar við at verða skaddur, bert tú teg ikki at, sum tú annars plagar, og tað vísir seg ofta at hava skaðar við sær. Tí havi eg tikið torføru avgerðina, sigur Todi Jónsson.

### Búnast leingi

Tá vit tosa meiri um hetta, ásannar Todi, at hugsanin um at halda frí frá landsliðnum hevur spøkt leingi.

– Tá vit í februar vóru við landsliðnum í Svøríki, tosaði eg við Allan Simonsen um hetta. Hann bað meg – eisini fyri mítt egna besta – halda fram á landsliðnum, og eg lurtaði eftir honum. Allan Simonsen veit jú, hvat hann tosar um. Í mars fóru vit so til Luksemburg og Russlands, og øll kenna søguna, hvussu tað gekst, tá eg longu í 1. hálvleiki í Luksemburg varð skaddur. Tann veruleikin hevur skundað undir avgerðina, men hon hevur kortini verið torfør at tikið.

Á heimasíðuni hjá einum Toda fjeppara í Danmark hava 542 fólk sagt sína áskoðan um framtíðina hjá Toda á landsliðnum. Ivaleyst er talan fyri tað mesta um føroyingar, og hjá teimum er litil ivi: 26 prosent halda, at Todi skal geva avboð, meðan 70,4 prosent halda, at hann skal ikki geva avboð til landsliðið.

Kvígir tú ikki fyri at koma í ringt ljós ímillum fótbóltshugaðar føroyingar?

– Tað vóni eg ikki. Eg eri ikki tann fyrsti fótbóltsspælarin, sum geri av at halda frí frá landsliðsfótbólti. Eg rokni við, at føroyingar skilja, at í løtuni stendur nógv upp á spæl hjá mær, og at teir fegnir vilja hava, at tað framvegis fer at gangast mær væl.

Todi Jónsson kom fyrstu ferð á landsliðið 15. juli í 1991, tá Turkaland og Sepp Piontek vitjaðu í Gundadali. Dysturin endaði 1–1, og Todi skoraði føroyska málið. Higartil hevur Todi spælt 43 landsdystir, og hann hevur skorað níggju mál.



*– Eg havi havt sera ilt við at taka avgerðina. Hjartað hevur verið fyri at spæla við Føroyum, men skilið hevur sagt mær, at akkurát nú átti eg at geva avboð.*

# Sogndal sleppur Kurt leysum

**Norska felagið hevur nú fingið fatur í Håvard Flo, og nú tykist Kurt Mørkøre at vera langt afturi á álopsrøðini í felagnum**

NOREG
*Jákup Mørk*



*Útlitini fyri spælitíð á besta liðnum hjá Sogndal eru sera vánalig, og nú hevur felagið boðað Kurt Mørkøre frá, at hann hevur frítt at fara*

Tað skerst ikki burtur, at klaksvíkingurin, Kurt Mørkøre, hevur havt eina umskiftiliga tilveru í norskum fótbólti. Síðani hann kom til Sogndal, hevur hann verið ein av hetjunum á liðnum og tað var ikki av ongum, at hann fekk eyknevni “Kong Kurt”.

Men tað var ímeðan Sogndal spældi í næstbestu, norsku deildini, at Kurt var málslúkurin á liðnum. Síðani Felagið flutti upp í bestu deildina, tippuliguna, hevur tað hinvegin verið sera trupult hjá honum at vinna sær pláss á besta liðnum og hann hevur enn sítt fyrsta mál í ár til góðar.

### Flo komin

Nú verður tað enn truplari hjá Kurt at koma á liðið, tí í vikuni hevur Sogndal fingið ein áleypara afturat. Tað hendi, tá ið felagið skrivaði undir ein tvey ára sáttmála við Håvard Flo, sum í løtuni spælir við enska 1. deildarliðnum, Wolverhamton.

Flo verður til reiðar at tørna til fyri Sogndal tann 1. juli. Tað er hann samstundis leysur av sáttmálanum við enska liðið og er sostatt ókeypis hjá Sogndal at ogna sær, stendur at lesa á norskum heimasíðum. Håvard Flo er ikki heilt ókendur í Sogndal. Hann spældi fyri felagið frá 1990 til ‘94. Síðani hevur hann verið í Stryn, AGF og Werder Bremen, áðrenn hann fór yvir um Ermarsund.

Eftirnavnið Flo er ikki ókent í norskum fótbólti. Håvard Flo er nevniliga systkinabarn brøðurnar Jostein Flo og tann enn meiri navnframa Tore Andre Flo.

### Leysur maður

Mikumorgunin stóð at lesa á heimasíðuni hjá Verdens gang, Sogndal hevur boðað Kurt frá, at hann hevur frítt at fara, um onnur feløg sýna honum áhuga. Í yvirskriftini spyr blaðið, um nakar vil hava vánaligasta leikaran í tippeliguni, og leggur afturat, at hann kann fáast fyri einki. Við hesum verður sipað til, at í fiktivu kappingini, VG-børsen, er Kurt tann leikarin, sum hevur lægsta miðalkarakterin fyri avrik síni higartil.

Við blaðið sigur Kurt, at hann sjálvandi er frustreraður um støðuna, og leggur afturat, at hann eisini veit orsøkina til, at tað ikki hevur gingist so væl hjá honum í ár.

- Spælið hjá Sogndal í dag hóskar als ikki til mín. Styrkin hjá mær er inni í brotsteiginum, og meðan vit í fjør vanliga fingu eini 15 innlegg í dystunum, er talan í mesta lagi um tvey til trý innlegg í hvørjum dysti nú. Langir bóltar og kontraálop er ikki nakað fyri meg.

Spurdur um framtíðina svarar Kurt, at hann enn ikki hevur gjørt nakað av í so máta. Hann vil sjálvandi fegin halda fram í bestu norsku røðini, men sigur seg eisini vera opnan fyri møguligum áhugaðum 1. deildarliðum. Tveir fyrispurningar hava verið úr Føroyum, men hesum er landsliðsmaðurin ikki áhugaður fyri í løtuni.